## Platin í Grønlandi

Felagið NunaMinerals, sum hevur leitað eftir platini í Fiskifjørðinum í Grønlandi, boðaði í gjár frá, at felagið hevur júst fingið kanningarúrslit, sum vísa, at tað loysir seg at halda fram við leitingini. NunaMinerals sigur, at útlitini fyri at finna platin og onnur evni sum palladium og rhodium eru góð. Virðini kunnu vera stór. Platin kostar tvær ferðir so nógv sum gull, og rhodium kostar tíggju ferðir meiri enn gull, sigur NunaMinerals.

## Bátur holvdist

Báðir menninir, sum við vóru, druknaðu, tá ein útróðrarbátur sakk í Ísafjarðardýpinum í Íslandi gjáranáttina. Báturin hvarv av radaranum, og bjargingartænastan sendi alt fyri eitt hjálp avstað. Tað vísti seg kortini at vera ov seint, ti tá bjargingin kom fram 20 minuttir seinni, var útróðrarbáturin holvdur og menninir deyðir. Bjargingartænastan sigur, at veðrið var vánaligt og ringur sjógvur. Í gjár bleiv útróðrarbáturin togaður til lands.

# Hálv miljón úr Føroyum kann hála fleiri miljónir úr Danmark

**Í Danmark er ein grunnur, sum verður róptur LOA-grunnurin. Hann veitir stuðul og ráðgeving til nýskapandi verkætlanir innan ítrótt, mentan og frítíðarvirksemi. Um Føroya landsstýri var tilmeldað hesum grunni við umleið hálvari miljón um árið, kundu føroyingar søkt um milliónir úr honum til alskyns endamál í Føroyum**



*- Nú talan er um at byggja skótahús í Runavík og við Leynavatn, ungdómshús í Árnafirði, virkishús í Klaksvík, ítróttarhøll í Sandoynni og í Skálafirði – bara fyri at nevna onkrar verkætlanir úr rúgvuni, høvdu vit havt møguleikar at søkt um stuðul úr LOA-grunninum, um Føroya landsstýrið var tilmeldað, sigur Petur Elias Petersen*

UNGDÓMSVIRKSEMI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Danski grunnurin, Lokale- og Anlægsfonden, sum er stovnaður í 1994, hevur 140 mio. krónur í eginpeningi.

Tað eru Danmarks Idrætsforbund, Danske Gymnastik- og Idrætsforeninger, Dansk Firmaidrætsforbund og Dansk Ungdoms Fællesråd, sum eiga eginpeningin í grunninum.

Aftrat hesum fær LOA-grunnurin, sum hann eisini verður róptur, á hvørjum ári umleið 80 mió krónur frá Danmarks Tipstjeneste, sum nú eitur Danske Spil.

Úr hesum grunni kann søkjast um pening til nýskapandi verkætlanir innan ítrótt, mentan og frítíðarvirksemi – í breiðum høpi.

Tað er mentamálaráðið hjá donsku stjórnini, sum umsitir LOA-grunnin.

### Stórir møguleikar

Petur Elias Petersen, sum er stjóri í føroysku ítróttarveddingini, heldur, at Føroyar høvdu havt góðar møguleikar at fingið pening og stuðul úr LOA til ymiskar verkætlanir, um vit vóru tilmeldaðir grunninum.

- Ein og hvør kann ikki vera tilmeldaður grunnin og kann tískil heldur ikki søkja úr honum. Hinvegin góðtekur LOA, at eitt nú Føroya landsstýri kann koma við árligum íkasti og soleiðis gera tað møguligt hjá føroyingum at søkja um stuðul til ymiskar verkætlanir, sum hava við ítrótt, mentan og ymiskt frítíðarlív at gera.

Hann sigur, at føroyski ítróttarheimurin hevur leingi vitað um LOA-grunnin og møguleikarnar at søkja úr honum.

- Fyri umleið tveimum árum síðan byrjaðu vit óformelt at venda okkum til landsstýrismannin, sum umsitir ítrótt og mentan um møguleikarnar fyri, at Føroya landsstýri tilmeldar seg grunnin og rindar tað, sum luttøkan kostar.

Petur Elias sigur, at landsstýrismaðurin, Jógvan á Lakjuni, sum umsitir ítrótt og mentan, als ikki hevur verið negativur, men enn er so einki hent, og tí hevur heldur ikki verið møguligt hjá føroyingum at søkt um stuðul til verkætlanir úr grunninum.

### Ymisk endamál

- LOA hevur eina heimasíðu, og har kunnu fólk síggja, at grunnurin seinastu árini hevur játtað pening til mong ymisk endamál, sum hava við ungdóm – ítrótt, mentan og ymiskt frítíðarvirksemi – at gera.

Petur Elias ivast onga løtu í, at

nógvar verkætlanir, sum eru frammi her á landi, høvdu havt møguleikar at fingið stuðul úr grunninum, og talan kann skjótt gerast um heilt stórar upphæddir, um verkætlaninar eru áhugaverdar.

- Grønlendska heimastýrið hevur verið tilmeldað grunnin í nøkur ár, og vit vita, eitt nú svimjihøllin í Nuuk hevur fingið eina munandi upphædd, sigur hann.

Hann væntar, at parturin hjá Føroya landsstýri og harvið atgongdin hjá føroyingum at søkja grunnin hevði verið um hálva miljón krónur um árið.

- Vit hava ikki skrivliga vent okkum til landsstýrismannin við hesum, men hava greitt honum frá, hvørjir møguleikarnir eru, leggur hann aftrat.

Á heimasíðuni hjá Lokale- og Anlægsfonden lesa vit, at grunnurin kann stuðla, vera við til at menna og ráðgeva um bygging innan ítrótt, mentan og frítíð, og talan kann vera um allar møguligar verkætlanir – heilt frá skótahúsum til felagshús av ymiskum slagi.

Grunnurin hevur nevniliga møguleikar at stuðla í øllum "hornum" innan ítrótt, mentan og frítíðarlív, og soleiðis eisini innan tónleik, dans, søvn og framsýningarvirksemi.

### Hentur møguleiki

Petur Elias Petersen vísir á, at nú talan er um at byggja skótahús í Runavík og við Leynavatn, ungdómshús í Árnafirði, virkishús í Klaksvík, ítróttarhøll í Sandoynni og í Skálafirði – bara fyri at nevna onkrar verkætlanir úr rúgvuni, høvdu vit havt møguleikar at søkt um stuðul úr LOA-grunninum, um Føroya landsstýrið var tilmeldað.

- Tað, sum vit mugu gera, er at taka upp samráðingar við grunnin og soleiðis fáa at vita, hvørjar treytirnar fyri tilmeldan eru.

Hann heldur, at tey sambond, sum eitt nú føroyska ítróttarveddingin hevur í Danmark, kundu "geitað" føroyskar myndugleikar á gátt hjá LOA-grunninum, soleiðis at partarnir kundu byrjað at tosað saman um tilmeldan og samstarv.

- Eg ivist onga løtu í, at hetta hevði verið ein góð íløga hjá Føroya landsstýri – ein íløga, sum við tíðini hevði komið fleiri falt aftur heim til Føroya til ymiskar verkætlanir her á landi, sigur Petur Elias Petersen, stjóri í føroysku ítróttarveddingini.



*- Eg ivist onga løtu í, at tað hevði verið ein góð íløga, um Føroya landsstýri tilmeldaði seg LOA-grunnin. Íløgan hevði við tíðini komið fleiri falt aftur til ymiskar verkætlanir her á landi, sigur Petur Elias Petersen, stjóri í føroysku ítróttarveddingini*